

# Tónleikur

*Lagt til rættis:*
*Sunneva H. Eysturstein*
*post@sosialurin.fo*



## Maria Guttesen

# Wide Open

**UMMÆLI** ★★★★★☆
*Tutl*

Tað er ein stuttlig kensla at fáa fordómar afturvístar. Tá tú heldur, at ein vøra – tað veri seg ein filmur, ein lenistólur, ein tvíflís ella sum í hesum førinum ein fløga – er keðilig og hevur lítið uppá seg, men hon so vísir seg at vera nógvar ferðir betri enn tað, tú hevði væntað.

Soleiðis var mín uppliving við »Wide Open« hjá Mariu Guttesen. Tá eg stóð við fløguni í hondini, var eg vís í, at tónleikurin einki fór at siga mær. Eg veit ikki heilt hví. Men Maria hevur nú ordiliga víst mær, at hon er ein stílfullur tónleikari, ið dugir at skriva løg, dugir at framføra á ljóðføri, dugir at framleiða tónleik og ikki minst dugir at syngja vakurt, kensluborið og egið.




»Wide Open« er millum frægasta føroyska gentupoppin, eg havi hoyrt higartil. Flestu løgini eru fangandi, flestu arrangementini góð, røddin er vøkur og raddarsamansetingarnar knívskornar og hugtakandi. Klaver-bygda lagið »I'm too Happy« er uttan iva tað besta á útgávuni, bæði lag, tekstur og arrangement.

Eg sakni tó eitt meira heilskapað konsept. At framleiðslan antin var ráðari og frekari ella at hon var reinari og snøggari. Í støðum, t.d í »Danged the things I Didn't Do«, blívur rútmusektiónin ov typisk og háskúlapolerað. Og í øðrum støðum, sum t.d i »8 Half Minutes« er huglagið ov fitt og pent og barnsligt til restina.



*Maria Guttesen gav út fløguna Wide Open á kvinnudegnum tann 8. mars*

Úttrykkið kundi yvirhøvur verið meira tjekkað. Sum nú er, er Maria Guttesen ov nógv ting í senn. Hon er kul og giggut, fitt og frek, ráð og snøgg, søt og sølt. Tað eru ov nógvir mótpólar, ið skapa eitt sindur av frustratión, tá ein skal til at hugsa ordiliga um tað. Men hetta kemur tó ikki til sjóndar, um tú ikki hugsar um tað. Útgávan er perfekt sum reinur radio-poppur, og tað er eisini har, hon hoyrir heima.

»Wide Open« er ein fín fløga, ið hóskar seg væl til bakgrundstónleik uppá tann góða mátan. T. d tá tú vaskar upp, sorterar rótiskuffuna ella gert døgurða. Tað er ein samanseting av væl smakkandi tónum, ið koma væl við í flest øllum løtum, tú ert í.

# Komandi fløgur

### Panic At The Disco

**Heiti:** Pretty. Odd
**Útgávudagur:** 24. mars
**Plátufelag:** Decaydance / Fueled By Ramen



**Stutt um:**
Panic at the Disco (ið fyrst itu Panic! At the Disco, men nú koyra víðari uttan !) høvdu í 2005 sítt stóra gjøgnumbrot við debut fløguni »A Fever You Can't Sweat Out«, ið seldi yvir 2.2 milliónir eintøk.
Næsta útgávan, »Pretty. Odd«, verður útgivin hendan mánaðin. Ljóðið hjá bólkinum er samansett av elementum úr m.a poppi, elektronika, dance og rokki. Staklagið av »Pretty. Odd«, ið eitur »Nine In The Afternoon«, varð útgivið síðst í januar og kann downloadast ókeypis, um tú bíleggur fløguna nú áðrenn útgávudagin á fueledbyramen.com.

Keyp fløguna digitalt á fueledbyramen.com ella iTunes
**Net:** myspace.com/panicatthedisco

### Moby

**Heiti:** Last Night
**Útgávudagur:** 31. mars
**Plátufelag:** Mute/EMI



**Stutt um:**
»Last Night« er sætta studio útgávan hjá Moby. Við hesari útgávuni hevur hann tikið alt tað, sum eitur New York náttarlív, og kókað tað niður í eina 65 minuttir langa fløgu.
Sjálvur sigur Moby, at fløgan er eitt slag av kærleiksbrævi til dance tónleik í New York. Til alt tað eklektiska, opna og fría, sum hann elskar við hesum býinum og tónleikarunum, DJ'unum og fólkunum í barrum og klubbum. Útgávan varð upptikin í heiminum hjá Moby í Manhattan, New York. Á moby.rcrdlbl.com kanst tú taka niður eina níggju minuttir langa sampling av »Last Night«.

Keyp fløguna á amazon.co.uk ella digitalt á iTunes
**Net:** myspace.com/moby

### Feadz

**Heiti:** Happy Meal EP
**Útgávudagur:** 28. mars
**Plátufelag:** Ed Banger Records/ BPitchControl




**Stutt um:**
Franskir electro DJ'ar eru mangir, og meistra teir eitt handverk, sum alsamt sæst spíra meira og meira fram ymsastaðni í heiminum.
Tey størstu nøvnini eru m.a. Justice, Mr. Oizo, Uffie og Sebastian, ið øll eru undir ultrakula og óhefta plátufelagnum Ed Banger Records, umframt Kavinsky, sum eisini er undir øðrum ultrakulum, óheftum plátufelag, kallað Record Makers. Ein av snillingunum millum hesar, ið klívur upp stjørnustigan í løtuni, er Feadz. Hesin hevur arbeitt saman við Mr. Oizo, er á konsertferð við Uffie og gevur um nakrar dagar út EP'ina »Happy Meal«.

Keyp fløguna digitalt á bleep.com ella iTunes
**Net:** myspace.com/feadz

### Brian Jonestown Massacre

**Heiti:** My bloody Underground
**Útgávudagur:** 15. apríl
**Plátufelag:** A Records/Target




**Stutt um:**
»My Bloody Underground« er 13 útgávan hjá Brian Jonestown Massacre, og er harumframt eisini fyrsta fløgan hjá bólkinum í fýra ár.
Fløgan er upptikin í Liverpool og Reykjavík og inniheldur løg, ið m.a kallast »Bring Me The Head of Paul McCartney«, »Just Like Kicking Jesus« og nakað so provokerandi sum »We Are The Niggers Of The World«.
Frontmaðurin, Anton Newcombe, leitar sum ikki einaferð eftir nýggjum, ekstremum leiðum at úttrykkja seg. Hetta ger útgávuna spennandi uppá nógvar mátar – bæði fyri fjepparar og ikki-fjepparar hjá bólkinum.

Keyp á amazon.co.uk ella digitalt á iTunes
**Net:** myspace.com/ brianjonestownmassacre

### R.E.M.

**Heiti:** Accelerate
**Útgávudagur:** 31. mars
**Plátufelag:** Warner




**Stutt um:**
R.E.M geva nú uppfylgjaran av »Around the Sun«, ið kom út í 2004, út. Hendan eitur »Accelerate« og er fjúrtanda studioútgávan hjá bólkinum.
Fløgan er upptikin í Vancouver og í Dublin við Bloc Party og Snow Patrol framleiðaranum Jacknife Lee. Við hesari fløguni hevur R.E.M lagt seg eftir at skriva styttri løg, og tað er eisini eydnast teimum væl. Uml helvtin av løgunum á »Accelerate« eru undir tríggjar minuttir long, harav ein fjórðingur av teimum eru líka yvir tveir minuttir. Tilsamans er fløgan 34 minuttir til longdar, ið ger hana til stytstu studioútgávuna hjá bólkinum higartil.

Keyp fløguna amazon.co.uk ella digitalt á iTunes
**Net:** remaccelerate.com